kundi fáa. Tá kom tann fyrsti. Hann loraði seg niður í sjógvin. Sámal gav út og vit hálaðu inn, (meðan menninir hildu fast í línuna.) Soleiðis komu allir í land.

Jógvan, tann sum doyði uppi á landi, honum gekst ikki so gott. Hann slepti línuni, tá hann kom niður í sjógvin. Tað bleiv eitt sindur leingi, áðrenn vit fingu fatur í hann. Sámal gjørdi endan fastan á seg sum seinasti maður og varð drigin í land.

## Upp úr fjøruni....

Vit fóru eini tríggir at prøva, hvussu langt upp vit kundu sleppa (upp í bergið). Tað gekk bara gott. Vit sluppu langt upp, so fóru vit niður aftur. Aðrir fóru uppaftur og høvdu eina fjøl við sær.

Teir sluppu tá upp undir tromina. Við hesi fjøl fingu teir trýst Ziska uppá bakkan. So fingu teir eina línu upp. Har var ein steinur til at seta línuna fasta í. Tað var heldur eingin annar steinur í nærheitini. Tá man fer at teinkja uppá tað aftaná, so sá tað næstan út, sum hann var lagdur har. Og tá gekk tað nokkso skjótt at fáa fólkið uppá bakkan. Til seinast vóru Sámal, Jógvan og eg eftir. Jógvan segði ikki eitt orð. Tað vísti seg, sum hann var lammaður. Vit máttu gera línuna á hann, og hann bleiv hálaður upp. So fór eg upp, og Sámal var eisini seinasti maður upp úr fjøruni. Nú vóru vit allir komnir uppá bakkan. Summir fóru til gongu við tað sama, sum teir komu upp á bakkan. Tað vóru ikki nógvir eftir á bakkanum, tá vit komu upp.

## ...og síðan at vinna upp hús

Uppkomin var eg so kaldur og lofnaður, at tað ber ikki til at fortelja tað. Tá kom Eliseus (Jacobsen) til mín og bjóðaði mær vøttirnar hjá sær. Eg fór so til gongu beinanvegin. Summir royndu at leiða Jógvan, men hann kundi ikki ganga, hann bleiv settur niður við ein varða. Pól orkaði heldur ikki at ganga, hann bleiv eisini settur undir ein annan varða. (Tað skuldi komast aftur eftir teimum.) Síðani komu allir til hús, hvar í summir blivu leiddir mestsum allan vegin.

Tá eg hevði gingið eina løtu, kom eg fram á skiparan (Dáva Joensen). Hann gekk eisini einsamallur. Eg fór eisini nakað skjótt forbí hann. Tá fór hann at rópa eftir mær. Eg vendi aftur til Dáva. Tá stendur hann reiðuliga uppundir knæ í einari kavafonn. So sigur hann:"Eg komi ikki longur, eg orki ikki meira". Eg tók í hondina á honum, og vit fóru víðari. Tá vit høvdu gingið nakað, sóu vit fýrtornið. Vit vistu einki, tað bleiv bara gingið undan veðrinum eftir telefonpelunum. Hvussu ofta hann segði: "Nú seti eg meg!" og eg roydni at toga á.

Men nú síggi eg, at íslendingarnir koma á hestbaki, tað var ferð í teimum. Teir komu til okkara og peikaðu okkum á portrið. Tá setti skiparin seg. Eg fekk hann aftur á føtur, og vunnu vit upp hús.

Hann bleiv hjálptur í song beinanvegin og eisini tríggir aðrir. Vit blivu teir flestu í hesum húsunum, sum vit komu fyrst til. Til matna vísti tað seg ikki at vera nógv til. Vit fingu kaffi og sukurmola. Tað vísti seg at vera lítið, tí vit vóru svangir. Men so bleiv ein stórur pottur settur út á komfýrin og feskur toskur varð koyrdur í pottin. Vit hjálptu til at fáa pottin at kóka. Tey høvdu bara turkaðar tonglar til at brenna. Tá tað var kókað, fingu vit fisk og smelt, og maturin bleiv betur og betur til hvørja máltíð. Tá vit høvdu etið, skuldu vit fara at sova. Vit fingu eitt sett av góðum undirklæðum.

Tann fyrsti svøvnurin hjá teimum flestu riggaði illa. Tað vísti seg sum at likamið var farið heilt út av funktión, tað var pína her og der. Tað var nógv beinini, tað gekk útyvir. Næstu ferð vit fóru at sova, breiddu vit ból á einum stovugólvi, og svóvu vit allir í einum bóli. Nakrir fóru í eitt annað hús. Øll klæðini blivu vaskaði. Eg haldi, at eingin hevði stivlar uppiá, tá vit komu til hús.

Men maskinmeistaran, Pól, hann komu teir so við, tá seint um kvøldið. Hann kom so at liggja inni í kamarinum, har eg og Ísakur úr Árnafirði svóvu. Tveir íslendingar arbeiddu uppá hann, tí teir uppdagaðu, at hann var ikki deyður, men Jógvan meintu teir var deyður, tá teir komu til hann. Men hann (Pól) fingu teir so lív í mitt um náttina. Tað var ein grúiligur gangur, hann helt, áðrenn hann hevði fingið skilið aftur ordiliga, tað gekk nógv yvir tann mannin.

Dagin eftir, fóru vit nakrir aftur til skipið. Tað vóru fleiri, sum ikki settu seg føran fyri at koma við. Tá høvdu íslendingarnir funnið trý lík. Sostatt fingu vit hesi trý lík heim við okkum umframt Jógvan, sum doyði, meðan hann sat undir varðanum.

## Væl móttiknir í Reykjavík

Annan dagin eftir, at vit eru komnir til hús, tá sigur skiparin, at tað var best at fara oman at kanna líkini, so vit kundu vera



*Hetta kann hava verið skerið, sum gjørdist lagnan hjá Ernestinu*



*Fjøran*



*Eitt var at koma í land, annað at komu upp gjøgnum frysta bergið*

sikrir í, hvør ið hvør var. Tá fóru vit einir tríggir oman at loysa av teimum. Teir vóru bundnir inn í segldúkum. Tað sá nokkso óhyggiligt út, men vit settu merki á teir, hvør ið hvør var. Men ikki tí, tað bleiv eisini gjørt, tá teir vóru farnir í kistu í Reykjavík.

Vit komu har hósdag, og sluppu avstað haðani sunnudag. Hendan sunnudag kemur Elias Sofus Hansen í Gøtu inn í Thorleifshøfn við "Verdandi." Hann frættir hesi tíðindi, hvat ið hent var. Hann fór í land ringdi til Selvog og fekk fatur í Dáva. Elias spurdi Dáva, um hann kundi hjálpa okkum. Sjálvandi kom tað ógvuliga væl við. Tað bleiv avgjørt, at Verdandi skuldi føra okkum til Grindavíkar. Har høvdu teir so forbindilsir við Reykjavík eisini.

Bilarnir stóðu har til at taka okkum